# Opið hús í Miðlahúsinum

Eins og tey tvey undanfarnu árini, verður Miðlahúsið í Vágsbotni opið allar ólavsøkudagarnar, líka frá fríggjadegnum 25. juli til ólavsøkudag 29. juli. Og aftur í ár er stór og fjølbroytt skrá. Sum vanligur siður hevur verið øll tey seinastu næstan 20 árini, fyrst í Smiðjuni í Lítluvík og seinastu tvey árini í Miðlahúsinum, so verður stór framsýning við øllum tekningunum hjá Óla P, sum hava staðið í Sosialinum seinasta árið.

Aftrat hesum fer Miðlahúsið aftur í ár at bjóða til filmsfyrisýning. Tað eru filmsbrot úr "Føroyskar søgur", sum fara at verða vístar sunnudagin og síðani báðar ólavsøkudagarnar. Hetta verður ein forpremiera av tí sera áhugaverda og forvitnisliga filmsprojekti, sum felagið Substanz við stuðuli frá Eik banka hevur tikið stig til. Savnaðir eru gamlir filmar tiknir í Føroyum seinastu nærum 100 árini. Hesi eru sett saman til filmar við talu og teksti, sum møguleiki verður at ogna sær á DVD seinni í heyst. Tá verður frumsýning í Norðurlandahúsinum av øllum tí samlaða verkinum.

Í Miðlahúsinum á ólavsøku verður tó møguleiki at fáa ein forsmakk uppá hetta verk og verða brot víst alla tíðina, meðan Miðlahúsið er opið.

Triði mentanarligi parturin av ólavsøkuskránni hjá Miðlahúsinum er tónleikur. Fleiri konsertir fara at verða ólavsøkudagarnar, og á skránni eru millum onnur. Stanley Samuelsen og Lena og Niclas. Eisini onnur kend nøvn verða at hoyra.

Ólavsøkudagarnar verður so eisini høvi hjá teimum mongu vitjandi ólavsøkugestunum at síggja hetta størsta, mest fjølbroytta og spennandi miðlaarbeiðsplássið í landinum.

(Stuðlar til tiltøkini í Miðlahúsinum á ólavsøku eru Føroya Banki, Atlantic Airways, Hvonn og Føroya Bjór)



Framsýningin við tekningum hjá Óla P er vorðin fastur táttur í Miðlahúsinum á ólavsøku



Konsertir eru eisini ein týðandi táttur í tiltøkunum í Miðlahúsinum á ólavsøku



## SKRÁIN • SKRÁIN • SKRÁIN • SKRÁIN • SKRÁIN • SKRÁIN

**Miðlahúsið/ Miðlagarðurin**
Fríggjadagin 25. juli
Kl. 15-20
Framsýning við Óla P tekningum
Tónleikur, kend føroysk nøvn

**Miðlahúsið/ Miðlagarðurin**
Leygardagin 26. juli
Kl. 15-20
Framsýning við Óla P tekningum
Tónleikur, kend føroysk nøvn

**Miðlahúsið/ Miðlagarðurin**
Sunnudagin 27. juli
Kl. 15-20
Filmur. Forpremiera: »Føroyskar Søgur«
Framsýning við Óla P tekningum
Tónleikur, kend føroysk nøvn

**Miðlahúsið/ Miðlagarðurin**
Ólavsøkuaftan 28. juli
Kl. 14-22
Filmur. Forpremiera: »Føroyskar Søgur«
Framsýning við Óla P tekningum
Tónleikur, kend føroysk nøvn

**Miðlahúsið/ Miðlagarðurin**
Ólavsøkudag 29. juli
Kl. 14-22
Filmur. Forpremiera: »Føroyskar Søgur«
Framsýning við Óla P tekningum
Tónleikur, kend føroysk nøvn

Vit ynskja tær ...
FØROYABANKI
www.foroya.fo